# Áskoðarar fara aftur at spæla

**Føroysku áskoðararnir, sum í Luksemburg spældi fótbóltsdyst móti heimaáskoðarunum, hava fyriskipað dyst, nú Luksemburg vitjar hjá okkum**

12. MAÐUR
*Jákup Mørk*



*Bæði á og uttan fyri vøllin hugnaðu áskoðararnir hjá báðum liðunum sær, tá dysturin í Luksemburg varð leiktur*

Eingin ivi er um, at tað var ein sera væleydnað ferð, sum føroysku fótbóltsáskoðararnir høvdu, tá teir í mars mánaði vitjaðu í Luksemburg. Umframt at A-landslið okkara fyri fyrstu ferð vann ein ein útidyst í HM-høpi, so sluppu áskoðararnir eisini fyri fyrstu ferð at royna seg í dysti, tá 12. maður hjá Luksemburg hevði bjóða av.

Tann dysturin endaði við 5-1 sigri til føroyska liðið, men tað var nú ikki úrslitið, sum hevði mest at siga hesum viðvíkjandi. Fyri báðar partar var talan um sera hugnaliga uppliving, sum umframt at tæna sum upphiting til veruliga landsdystin, eisini var við til at styrkja vinarbondini millum hesar báðar lítlu tjóðirnar.

## Endurtøka

Føroyski 12. maðurin var eisini sera fegin um tiltakið, og boðini tá vóru alt fyri eitt, at hetta mátti endurtakast, tá Luksemburg skuldi koma á vitjan. Hetta verður longu seinast í hesi vikuni, og sum skilst, eru allar fyrireikingar hesum viðvíkjandi nú komnar í rættlag.

Í tíðindaskrivi hevur 12. maður boða frá, at dysturin verður leiktur á Tórsvølli, fríggjadagin kl. 18.00. Dómari í dystinum verður eingin annar enn fyrsti altjóða dómari okkara, Nemus Napoleon Djurhuus, so altjóða dámur er eisini yvir dystinum. Spælt verður annars tvær ferðir 30 minuttir, og verður loyvt báðum liðum at hava flúgvandi útskifting.

Føroyskir fótbóltsáskoðarar, sum hava hug at taka lut í dystinum, skulu boða frá hesum á telefon 21 3212.

Formaðurin í 12. manni, Regin Egholm, sigur annars, at enn er ikki heilt fastlagt, hvar spælararnir fara at savnast eftir dystin, men at ætlanin so er, at liðini kunnu sær okkurt ábit saman.

Ítróttaráðgevin 100 ár:

# Hundrað ár liðin, síðani Poul E. Petersen varð borin í heim

**Ítróttasamband Føroya heiðrar minnið um ein av virknastu monnum innan ítróttarørsluna við at lata serstøk heiðursprógv, ið bera navn hansara.**

RUNDUR DAGUR
*Tíðindaskriv*

Mikudagin 29. august eru liðin 100 ár síðani Poul E. Petersen varð borin í heim í Sørvági. Sum ungur fekk Poul tokka til ítrótt. Eftir lokið lærarskúlaprógv í 1923 varð hann settur sum lærari í Mykinesi og røkti hetta starv til 1941. Hesi árini sum lærari í Mykinesi nam hann sær dyggan lærdóm til ymsar tættir innan ítrótt — bæði á ársskeiðum á danska læraraháskúlanum og á ymsum ítróttaskeiðum uttanlanda.



## Var sera virkin

Í 1938 varð Poul E. Petersen útnevndur ítróttaráðgevi, men røkti eisini lærarastarv fram til 1944, tá hann fór at virka sum ítróttaráðgevi burturav fram til 1954, tá starv hansara varð niðurlagt, av tí at skúlaumsjónin varð umskipað.

Poul E. Petersen varð sera virkin maður og árini hann starvaðist sum ítróttaráðgevi vakti hann ans fyri ítrótti yvirhøvur og eydnaðist honum eisini at fáa ítrótt inn um skúlagátt sum fasta lærugrein við flestu av landsins skúlum. Hann legði hesi ár eisini fleiri skrivlig rit um ítrótt úr hondum, eitt nú um svimjing, hond- og fótbólt og um fimleik og skúlaítrótt.

Árini hann var í Danmark fekk hann stóran ans fyri hvussu danska ítróttarørslan varð skipað og eitt tað fyrsta hann gjørdi, tá hann varð settur í starv sum ítróttaráðgevi, var at fáa í lag eina samskipan av føroyskum ítróttafeløgum, eitt ítróttasamband. Ítróttasamband Føroya varð sett á stovn 4. apríl 1939 og varð Poul E. Petersen kosin fyrsti formaður í ÍSF, og hetta starv røkti hann, til hann á aðalfundinum við árslok 1946 bar seg undan afturvali.

Poul Petersen var eisini blaðstjóri á Ítrótttatíðindum, blaðnum hjá ÍSF, frá 1. árgangi til nr. 7 í 7. árgangi 1947. Hann helt eisini skeið fyri lærarum, serliga í frælsari ítrótt og í svimjing. Hesi skeið vórðu hildin á sumri og vórðu nøkur teirra hildin í Mykinesi.

Tá ítróttaráðgevarastarvið varð niðurlagt í 1954 fór Poul E. Petersen í fyrsta umfari í starv sum læraravikar og ferðalærari, men frá 1. september 1956 fekk hann fast starv við Tórshavnar Kommunuskúla og røkti hetta starv til hann, eftir umsókn, fór frá við eftirløn í august 1971.

## Ikki bert ítróttur

Tað var ikki bert innan ítrótt at Poul E. Petsren var virkin. Árini 1939-50 var hann næstformaður í Føroya Lærarafelag og varð hann í 1954 kosin til formann – eitt starv sum hann røkti til 1960. Umframt mong onnur álitisstørv var hann limur í Føroya Skúlastjórn 1968-75 og legði hann úr hondum fleiri bøkur, bæði uppruna lesibók og týðingar.

Poul E. Petersen andaðist 25. apríl 1977.

Poul E.Petersen hevði serligan tokka til svimjing og frælsa ítrótt, ið stóðu hjarta hansara næst. Men hann var altíð virkin fyri fjøldina og øllum ítróttagreinum og hevur hann havt ómetaliga stóran týdning fyri alla ta føroysku ítróttarørsluna.

Fyri at heiðra minni um ítróttaráðgevan Poul E. Petersen, ið legði lunnar undir Ítróttasambandið og fekk skipanina av ymsu ítróttagreinum í rætt lag, hevur ÍSF gjørt av, at tað á hvørjum ári skulu handast tvey heiðursprógv, ið bera navnið hjá ítróttaráðgevanum — eitt til mann og eitt til kvinnu, sum hava gjørt vart við seg og tænt frælsu ítróttini á serstakan hátt. Fyrstu heiðursprógvini verða latin í ár.

Í dag, mikudagin, eru 100 ár liðin, síðani Poul E. Petersen var borin í heim.

## HB hevur kært

Dysturin í aðru deild millum Skála og HB varð leiktur fyri góðum tveimum vikum síðani, men er dysturin ikki liðugur á pappírinum.

Sum kunnugt – og sum tað eisini framgekk eisini av blaðnum í gjár – so kærdi Skála nýtsluna av tveimum leikarum hjá HB.

Kappingarnevndin hjá FSF gav Skála viðhald í kæruni, og dømdi HB at tapa dystin. Í HB halda tey seg tó hava handlað í góðari trúgv, og tískil er avgerðin hjá kappingarnevndini nú kærd til dómsnevndina.
*-jm*



Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna




Ja!

Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______

Bústaður: ______

Postnr.: ______

Bygd/býur: ______

Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn